# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað, sum bindur meg og Barrack Obama saman, er sterkari enn tað, sum skilir okkum*
*John McCain*

# McCain legði sjógv ímillum seg og Bush

**John McCain lýsti seg sjálvan sum ein sjálvstøðugan og nýskipanarhugaðan politikara, og at hann fer at virka fyri broytingum í amerikanska samfelagnum, verður hann forseti**


*- Broyting er á veg í Washington, segði John McCain í røðu síni*
*Mynd: Polfoto*

Sum væntað legði republikanska forsetavalevnið dent á at lýsa seg sum ein øðrvísi politikara enn George W. Bush, forseta. Teir báðir hava ikki altíð drigið eina línu og sita sambært politiskum eygleiðarum ikki væl um sátt.

- Eg arbeiði ikki fyri ein flokk. Eg arbeiði ikki fyri áhugabólkar. Eg arbeiði ikki fyri meg sjálvan. Eg arbeiði fyri tykkum, segði John McCain á uppstillingarfundinum hjá republikanska flokkinum í St. Paul í Minnesota í nátt.

Eftir at hava takkað flokkinum fyri at hava víst sær tað álit at stilla hann upp sum forsetavalevni, tók McCain tann politiska partin av røðuni, og tað var týðiligt, at við honum sum forseta skal amerikanska samfelagið broytast. Skattur, útbúgving og orkupolitikkur fingu serliga umrøðu.

- Vit fara í hernað ímóti øllum trupulleikunum. Vit skulu framleiða meiri orku heima hjá okkum sjálvum, , segði McCain og vissaði amerikanararnar um, at hann hevur evnini til at leiða teir og landið.

- USA stendur fyri nógvum avbjóðingum, men eg ræðist tær ikki, segði tann 72 ára ganli senatorurin og bleiv dúgliga fagnaður.

Hann segði seg hava stóra virðing fyri mótpartinum Barrack Obama, og at tað, sum bindur teir báðar saman, er sterkari enn tað, sum skilir teir. Hann vísti á, at sum senatorur hevur hann ofta arbeitt saman við demokratunum, og tað ætlar hann sær eisini at gera, verður hann forseti, segði hann.

- Broyting er á veg í Washington, segði McCain.

## STUTT SAGT

### Professari smuglaði rúsevni

Í Finnlandi hevur løgreglan handtikið ein mann, sum arbeiðir sum professari við lærda háskúlan í Helsinki. Maðurin er tikin, tí myndugleikarnir hava illgruna um, at hann er við í einum altjóða smuglarakervi, sum hevur smuglað rúsevni til Finnlands.

Finska løgreglan hevur kannað smuglaramálið leingi, og sambært tí, sum er komið fram, hevur tann tikni professarin samstarvað við eitt smuglarakervi, sum er virkið í Russlandi og Estlandi umframt í Finnlandi. Í vár legði løgreglan hald á 23.000 ecstasy-tablettir, sum hetta sama kervið hevði smuglað til Finnlands, og tað var beint eftir hetta, at løgreglan fekk illgruna til professaran og nøkur onnur fólk, skriva finsku bløðini.

Myndugleikarnir siga, at higartil eri níggju fólk tikin í sambandi við smuglingina. Tvey teirra vórðu tikin í vár, tá løgreglan kom fram á tær nógvuecstasy-tablettirnar. Sambært finska útvarpinum hevur løgreglan funnið rúsevni í einari íbúð hjá lærda háskúlanum í Helsinki, og skal professarin hava lagt tað har.

### Mamman fekk ikki deyðadóm

Ein kvinna í USA, sum bleiv funnin sek í at hava beint fyri sínum egna barni í einum mikrobylgjuovni, slapp undan deyðarevsing, hóast ákæruvaldið hevði biðið rættin døma kvinnuna til deyða fyri brotsgerðina.

Málið var fyri einumm nevningatingi, og eftir at hava tosað aftur og fram um avhoyringarnar í fimm tímar samdust nevningarnir um, at tann 28 ára gamla China Arnold skuldi fáa lívlangt fongsul. Kvinnan var dømd sek frammanundan, og nevningarnir skuldu tí bara gera av, hvørt hon skuldi dømast til deyða ella fáa lívlangt fongsul.

Nú skal dómarin so gera av, um China Arnold skal sita alt sítt lív í fongsli, ella um hon kann royndarleyslatast um 25 ella 30 ár, skrivar AP.

## Olmert verður ákærdur

Um vikuskiftið fer ísraelska ákæruvaldið væntandi at kunngera, at landsins forsætisráðharri, Ehud Olmert, verður ákærdur fyri fíggjarligt óreglusemi. Teir seinastu dagarnar hava ísraelsku fjølmiðlarnir sagt, at forsætisráðharrin verður ákærdur fyri at hava tikið ímóti ólógligum pengum frá einum amerikonskum vinnulívsmanni, og at hann skal hava misbrúkt sítt politiska vald til at hjálpa einum vinmanni. Umframt forsætisráðharri er Ehud Olmert formaður í flokkinum Kadima.

# Obama fer at draga Bush í rættin

**Vinnur Barrack Obama forsetavalið, skal undanmaðurin sleppa at svara fyri seg**


*Bush kann verða rættarsøktur, verður Obama eftirmaður hansara*
*Mynd: AP*

Barrack Obama og varaforsetaevni hansara, Joe Biden, ætla ikki, at George W. Bush skal sleppa úr Hvítu Húsunum stillisliga. Sambært sjónvarpinum ABC segði Joe Biden í gjár, at Obama fer at leggja sak ímóti Bush, vinna demokratarnir forsetavalið í novembur.

- Er grundarlag fyri rættarsókn, verður tað gjørt, segði Biden á einum veljarafundi í Deerfield Beech í Florida. Hann legði dent á, at hann og Obama vilja ikki hava hevnd fyri nakað, men at ætlanin er at vísa, at eingin amerikanari, heldur ikki forsetin, er oman fyri lógina.

-Vinna vit valið, fáa vit ikki ein løgmálaráðharra, sum brýtur reglurnar, og vit fáa heldur ikki ein forseta, sum ikki skilir amerikonsku grundlógina, segði Joe Biden sambært ABC.

Orðini hjá Joe Biden minna um tað, sum Barrack Obama segði í vár. Í samrøðu við blaðið Philadelphia Daily News segði hann, at hevur stjórnin hjá Bush framt lógarbrot, má tað kannast. Eitt nú hava fleiri demokratar í Kongressini sagt, at tað, sum er hent í fangaleguni í Guantanamo, er nóg mikið til at draga verandi umsiting í rættin.